gult22 cyan22 magenta22 svart22

Todi tættari toppinum

Danskur fótbóltur: Møguleikarnir hjá FCK at vinna DM styrknaðu, tá teir vunnu á einum av kappingarneytunum, og tá Silkeborg tapti

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Útlitini fyri at tað aftur í ár verður ein føroyingur ímillum donsku fótbóltsmeistararnar eru størri eftir vikuskiftið, enn tey vóru undan 27. umfarinum.

Í fjør var Jákup Mikkelsen danmarksmeistari. Tað eru seks umfør eftir at spæla í superliguni, og tað kann væl vera, at Todi Jónsson og FCK fara at vinna meistaraskapin.

Eftir 26. umfarið vóru Silkeborg og FCM á odda. Brøndby var á triðja plássinum, og FCK var nummar fýra. Sunnudagin tapti Silkeborg 1–0 í Odense. FCM spældi ikki fyrrenn í gjárkvøldið ímóti AGF. Dysturin varð spældur eftir at blaðið var farið til prentingar. Um FCM vann, so løgdu teir seg aftur á odda. Í morgin venda vit aftur til, hvussu tað gekk við tí.

Brøndby vann heili 4–0 í Haderslev ímóti niðurflutta HFK Sønderjylland, og harvið vann Brøndby – fyribils í hvussu so er oddasessin. FCK vann 1-0 á heimavølli ímóti Viborg. Tað hevði við sær, at FCK bara er eitt stig aftanfyri Brøndby, og tað er ikki nógv, tí tað eru seks umfør eftir at spæla.

Nógv lív í Parkini

Í miðal hava tað verið umleið fjúrtan túsund áskoðarar til heimadystirnir hjá FCK í ár. Hesa ferð vóru teir í góðum líkindum í gásareygum ikki fleiri enn 7.302. Orsøkin mundi vera tann, at FCK hesa ferð spældi heimadystin í Brøndby. Tað vóru ikki allir áskoðararnir so fegnir um, tí teir síggja Brøndby sum argasta mótstøðuæliðið hjá FCK.

At FCK hesa ferð spældi í Brøndby komst av, at tað er annað lív enn fótbóltur í Parkini í hesum døgum. Teir hava lagt tak á Parkina, og fyrsta stóra tiltakið í størsta innilokaða hølinum í Norðurlondum er um at fara at bakkastokki. Talan er sjálvandi um europeiska grand prixi, sum verður í Keypmannahavn komandi leygarkvøld.

Heine í miðdeplinum

Undan 27. umfarinum av superliguni varð nógv tosað um, at nú fór Hene Fernandez í FCK at dystast við gomlu liðfelagarnar hjá sær í Viborg.

Jydarnir høvdu undan dystinum góðan møguleika at vera við í kappingini um DM. Teir hava framvegis møguleikan, men hann minkaði, tí Viborg tapti 1–0.

Heine Fernandez skoraði málið upp á brotsspark. Av tí dóminum stóðst nógv tos og eitt sindur av øsing. Dómarin metti, at ein av verjuspælarunum hevði felt Heine Fernandez. Tvætl søgdu spælararnir og venjarin hjá Viborg, sum hildu, at talan var um filming.

Álopsspælarin hevur ikki roynst nakað serligt í FCK. Í fyrsta dystinum eftir vetrarsteðgin skoraði hann upp á brottspark. Síðani hevur hann einki mál fingið, men at hann er tryggur úr ellivu metrum, vísti hann aftur sunnudagin.

Roy Hodgson, venjarin hjá FCK, ásannaði eftir dystin, at talan var um ein tunnan brotssparksdóm. Men hann helt, at í síðsta enda verða dómaramistøk býtt ikki so misjavnt. Í hesum førinum sipaði hann til, at FCK seinastu tíðina hevur mist trý mál, tí dómarar og hjálpardómarar hava mistikið seg.

Todi Jónsson var sum vanligt ímillum teir fyrstu ellivu hjá FCK. Dysturin sum heild v ar linur. Liðini tóktist hava stóra virðing hvørt fyri øðrum, og uppløgdu málmøguleikarnir vóru fáir. Todi, sum stutt undan leikloki varð útskiftur, hevði ein friðarligan dag.

Herfølge hongur uppi

AB, sum stríðst fyri at halda um plássið í deildini, kom út í orduligt ódnarveður í Aalborg, har heimaliðið vann 4–1.

Herfølge spældi ikki. Teirra dystur ímóti Lyngby verður mikukvøldið. At AB tapti stórt hevur við sær, at vánirnar hjá Herfølge í hvussu so er ikki versnaðu. Um teir vinna ímóti Lyngby, so verður munurin millum liðini bara eitt stig. Tað eigur at styrkja um stríðshugin hjá Jákupi Mikkelsen og teimum.

FCK heldur framvegis fast um møguleikan fyri gullmerkjum, nú endaspurturin í donsku superliguni av álvara er settur í gongd

Eingin føroyingur við Sogndal

Norskur fótbóltur: Julian Johnsson var skaddur, og Kurt Mørkørre kom ikki á vøllin, tá Sogndal tapti á útivølli í Bergen

TIPPELIGAN
Jóannes Hansen

Tað man vera langt síðani, at eingin føroyingur hevur verið á liðnum hjá Sogndal. Í fjør vóru teir ofta tríggir á liðnum, og í ár hava teir verið tveir. Sum vit nevndu í blaðnum í síðstu viku, so er Julian Johnsson so mikið skaddur, at tað ikki ber honum til at spæla teir næstu dagarnar.

Kurt Mørkøre hevði verið ímillum teir fyrstu ellivu í fýra teimum fyrstu umførunum, men sunnudagin kom hann ikki á vøllin.

Undan útidystinum í Bergen ímóti Brann hevði venjarin tikið avleiðingarnar av, at tað higartil í ár ikki hevur eydnast Kurt Mørkøre at skora mál. Føroyski landsliðsmaðurin var ikki á liðnum, og hann varð heldur ikki skiftur inn, tá Sogndal síðstu løtuna royndi at koma afturíaftur.

Kurt er tað, sum teir kalla typiskur boksspælari. Tað vil siga, at hann er vandamiklast, tá hann liggur í brotsteiginum og dyrgir eftir møguleikunum. Men sovornir møguleikar eru sum lundi á jólanátt hjá Sogndal, nú teir eru í bestu deildini. Serliga á útivølli gongst illa at koma til sovornar møguleikar. Sogndal spælararnir liggja oftast aftarlaga á vøllinum, og so senda teir langar bóltar fram. Kurt hevur ongantíð verið nakar kapprennari. Tá er ungi Tommy Øren meiri vandamikil.

Nógv fólk

Sogndal og Brann Bergen liggja ikki so langt hvørt frá øðrum. Tí var talan um eina lokal uppgerð, og tað sást aftur á áskoðaratalinum. 13.032 áskoðarar vóru og hugdu at.

Hagtølini siga, at heimaliðið var greitt omaná. Brann hevði níggju málmøguleikar, og Sogndal hevði tveir. Men í 1. hálvleiki kom einki mál.

Heimaliðið setti hol á, tá seinna umfarið var seks minuttir gamalt, og seks minuttir seinni øktu teir til 2–0. Fimm minuttir fyri leiklok eydnaðist tað Sogndal at minka um munin og harvið at seta eitt sindur av spenningi í síðstu løtuna. Tommy Øren skoraði málið hjá Sogndal.

Í norskum fótbólti og serliga hjá teimum, ið liggja eitt sindur tungt í sjónum, vísir tað seg, at stigini koma til høldar á heimavølli, meðan tað skerst verri á útivølli. Komandi vikuskifti verður tað ivaleyst hjá Sogndal at takast við á heimavøllinum, tí tá fáa teir vitjan av Viking, sum telist millum oddaliðini.

Tað er ikki serliga sannlíkt, at Julian verður komin fyri seg aftur komandi sunnudag. Og so fæst at síggja, um venjarin velur at brúka Kurt Mørkøre á heimavøllinum. Tað munnu vit føroyingar í hvussu so er vóna.

Tíðirnar eru broyttar

Skála vann uppiborna sigur á aldursforsetanum í føroyskum fótbólti, sum tikist vera meira slitin enn gott er

2. DEILD
Jákup Mørk

Dysturin á Skála leygardagin var eitt fínt dømi um, hvussu stórt umskiftið hevur verið í føroyska fótbóltsheiminum seinnu árini.

Fyri bara tíggju–fimtan árum síðani vildi tað verið óhugsandi, at besta mansliðið hjá Skála skuldi kunna gjørt nakað sum helst við tvørámenn. Ja, helst hevði tað verið óhugsandi, at liðini yvir høvur vóru at finna í somu deild.

Kaldur veruleiki

Hetta er tó beiski veruleikin, sum tvørámenn mugu liva við í dag, og hann mundi ikki gerast søtari av, at Skála vann ein greiðan sigur á TB.

Í fyrra hálvleiki mundi TB valla hava eina roynd móti málinum hjá Skála, meðan skálamenn í hinum endanum fleiri ferðir vóru nær við, og eisini fingu løn fyri stríðið ta einu ferðina. Hetta var eftir eitt sera vakurt álop, sum byrjaði afturi hjá málverjanum. Eftir uppspæl í vinstru varð skifti yvir í hitt borðið, har Marius Joensen skjótt trilladi aftur til Alexandur Johansen, og hesin var ísakaldur, tá møguleikin beyðst.

Alexandur hin stóri

Av Skála sigst annars um dystin, at tað var eingin ivi um, hvør besti leikarin á vøllin var hendan dagin. Alexandur Johansen var við í so at siga øllum tí, sum Skála skpati frameftir á vøllinum, og hann var eisini høvuðsmaðurin, tá Skála í seinna hálvleiki tvífaldaði leiðsluna.

Saman við Tummasi Olsen broderaði hann seg ígjøgnum verjuna, og alt endaði við, at Tummas gjørdist púra leysur í brotsteiginum og hevði lætt við at skora.

Seinasta málið hjá Skála kom eftir eina sanna bumbing av TB málinum, har málverjin fyrst hálvbjargaði í tveimum atløgum, áðrenn Marius Joensen at enda setti bóltin í málið.

Úrslitið hevur við sær, at Skála heldur óvæntað hevur sett seg á fremsta sessin í aðru deild, nú tvey umfør eru farin aftur um bak. Enn er sjálvandi langt á mál, men fyribils tykjast teir í hvussu so er at hava rokkið málinum, sum teir settu sær undan kappingarárinum. Nevnliga at stabilisera liðið.

TB er hinvegin at finna í niðar endanum av talvuni, og lítið ella einki bendir á, at teir í bræði fara at hava ein aktivan leiklut á føroysku fótbóltstindunum.

Skála-TB 3-0 (1-0)
1-0: Alexandur Johansen
2-0: Tummas Olsen
3-0: Marius Joensen

Vladimir Kramnik fingið avbjóðara

Tað verður hvørki Gary Kasparov ella nakar annar telvari,sum fær møguleikan ímóti Kramnik í oktober mánaða í ár. Tað verður nevnliga heimsins sterkasta talvforrit, Deep Fritz 7, sum vann sær sæti yvir av Kramnik, tá tað vann finaluna á Deep Junior herfyri.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Mest umtalaða talvforrit er helst Deep Blue, sum í 1997 vann ein stuttan dyst á Kasparov. Mennirnir aftanfyri Deep Blue hava tó seinasta árið hildið seg í skugganum, og gav hetta møguleikan til Deep Fritz 7 og Deep Junior, sum eru kendastu og sterkastu aktivu forritini í løtuni.

Tað er Braingames.net sum eisini skipaðu fyri HM dystinum millum Kasparov og Kramnik, ið hava fingið hendan tvídyst í lag.

Ótrúlig vend

Telvast skulu 24 talv, og eftir fimm talvum hildu flest øll at avgerðin longu var follin, tí Deep Junior hevði við frálíkum álopsspæli lagt seg á odda heili 5-0. Men so fann Deep Fritz verjuspælið fram, og eisini góða spælið fram. Tá dysturin var komin hálva leið var støðan 8,5-3,5 til Deep Junior.

Seinnu helvt vann Deep Fritz, sum hevði funnið veikleikar Deep Juniors, við somu skoru, sum merkti at 12-12 bleiv endaliga støðan, og umdystur bleiv tí leiktur. Hendan vann Deep Fritz 2-0, og sleppur tí at royna seg ímóti sjálvum heimsmeistarnum í oktober.

Á vári 2002 verður telvari funnin sum sleppur at royna seg, menniskja ímóti menniskja, ímóti Kramnik í oktober 2002. Merkiligt at hugsa sær at Kasparov er noyddur at telva seg í finaluna, men so er og verður.

Sokolov og Radjabov javnir

Tann kendi stórmeistarin Ivan Sokolov, sum í fleiri førum hevur vitjað Føroyar, telvaði við í stórkappingini Dos Hermanas í Spania herfyri. Millum teir tíggju telvarnir varð eisini 14 ára gamli stórmeistarin Teimour Radjabov, sum var við í GM kappingini í heyst í Havnini. Radjabov hevði lægsta ratingtal í bólkinum.

Omanfyrinevndu telvarar vórðu ongantíð rættiliga við í toppstríðnum, men endaðu báðir á einum deildum áttinda plássi við fýra stigum av níggju møguligum, sum var eitt megnarúrslit hjá unga Radjabov, men heldur ivasamt hjá Sokolov. Vinnarir blivu Alexey Dreev og Ilia Smirin við hálvumsætta stigi hvør.

Talvið hesa vikuna

Deep Fritz - Deep Junior
BGN World Qualifiers Cadaques (17), 29.04.2001

Talv nummar seytjan. Deep Fritz 7 minkar her um munin, og vinnur seinni dystin.

1.d4 Nf6 2.Nf3 d5 3.c4 c6 4.e3 e6 5.Nbd2 Nbd7 6.Bd3 Bd6 7.0-0 0-0 8.e4 dxe4 9.Nxe4 Bc7 10.Bg5 h6 11.Bh4 g5 12.Nxf6+ Nxf6 13.Bg3 Bxg3 14.hxg3 Kg7 15.Qe2 Qc7 16.Rad1 Rd8 17.Bb1 b6 18.Ne5 (Deep Fritz hevur betri og fríari spæl) 18...Ba6 19.f4 g4 20.f5 exf5 21.Rxf5 Rd6 22.Rdf1 Qe7? [22...Bc8 er einasti leikur Deep Junior kann brúka] 23.Qd3 Rh8 (Hvítur hótti Rxf6 og mát á h7-h8)



24.Qa3! (vinnur materiali) 24...c5 [24...Bc8 25.Rxf6] 25.Qxa6 cxd4 (nú kann Junior gevast, men hann treiskast nakrir leikir enn) 26.R1f4 Re8 27.Qa3 d3 28.Nxd3 Qe3+ 29.Kh2 Ree6 30.b4 Qd2 31.Nf2 Re7 32.b5 Re3 33.Qxa7 Ree6 34.Nxg4 Qd1 35.Nxf6 Rxf6 36.Bc2 Rxf5 37.Bxd1 Rxf4 38.gxf4 1-0

Støðan, danska superligan

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	Brøndby	27	14	6	7	63	34	29	48
2	FCK	27	12	11	4	40	22	18	47
3	FCM	26	13	8	5	45	34	11	47
4	Silkeborg	27	12	11	4	39	29	10	47
5	Viborg	27	12	6	9	44	30	14	42
6	OB	27	11	5	11	40	35	5	38
7	Lyngby	26	11	5	10	35	44	-9	38
8	AaB	27	9	10	8	43	29	14	37
9	AGF	26	9	4	13	40	51	-11	31
10	AB	27	5	12	10	33	37	-4	27
11	Herfølge	26	5	8	13	30	49	-19	23
12	HFK Sønderj.	27	1	6	20	25	73	-48	9

Støðan, danska 1. deild

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	Frem	24	15	6	3	58	24	34	51
2	Esbjerg	23	14	7	2	57	20	37	49
3	Køge	24	14	7	3	51	26	25	49
4	Vejle	24	12	7	5	58	32	26	43
5	B93	24	12	3	9	44	33	11	39
6	Farum	24	11	5	8	47	35	12	38
7	Brønshøj	24	11	2	11	47	49	-2	35
8	B 1913	24	9	7	8	32	35	-3	34
9	Hvidovre	24	8	8	8	46	43	3	32
10	AC Horsens	24	7	10	7	29	32	-3	31
11	Randers F.	23	7	6	10	30	41	-11	27
12	Skive	24	6	7	11	40	59	-19	25
13	FC Aarhus	24	4	8	12	29	57	-28	20
14	Fremad A	24	4	7	13	33	52	-19	19
15	Ølstykke	23	5	4	14	27	63	-36	19
16	Birkerød	23	2	4	17	29	56	-27	10

Støðan, norska tippeligan

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	Viking	5	4	1	0	15	6	9	13
2	Rosenborg	5	4	0	1	15	6	9	12
3	Molde	5	3	1	1	13	4	9	10
4	Odd. Grenl.	5	3	1	1	10	4	6	10
5	Lillestrøm	5	3	1	1	9	7	2	10
6	Brann	5	3	0	2	12	9	3	9
7	Stabæk	5	3	0	2	6	4	2	9
8	Tromsø	5	2	0	3	5	9	-4	6
9	Sogndal	5	2	0	3	4	9	-5	6
10	Lyn	5	1	1	3	6	8	-2	4
11	Moss	5	1	1	3	4	8	-4	4
12	Bryne	5	1	1	3	5	12	-7	4
13	Strømgodset	5	0	2	3	6	15	-9	2
14	Bodø/Glimt	5	0	1	4	4	13	-9	1

PF Restorffs SISU

gult23 cyan23 magenta23 svart23